# Ætla at svimja seg fram um hini

**Landsliðsvenjarin í svimjing hevur sett sær sum mál, at føroyingar um nøkur ár skulu verða besta oyggin, tá ið tað ræður um svimjing. Í ár stíla føroyingarnir eftir einum plássi millum fimm tey bestu**

SVIMJING
*Eyðun Klakstein*



*– Kappingarnar á Oyggjaleikunum eru sera tættar, og tí kann alt tapast upp á ein vánaligan start ella eina miseydnaða vending. Men um vit sleppa undan mistøkum, so kunnu vit fáa nógv góð úrslit, sigur Petur Heðin á Fløtti, landsliðsvenjari*

Føroyskir svimjarar hava ferð eftir ferð vunnið føroyingum heiðursmerki á Oyggjaleikunum, og stendur tað til landsliðsvenjaran í svimjing, so skulu føroyingar gerast besta oyggin innan svimjing um nøkur ár.

– Tað ræður um at seta sær nøkur mál fyri framtíðina, og hóast eg ikki havi gingið og rópt hart um hetta, so ger tað einki, um vit onkuntíð siga tað. Vit skulu stíla eftir at gera best á Oyggjaleikunum um nøkur ár, sigur Petur Heðin á Fløtti, sum seinastu tvey árini hevur verið landsliðsvenjari í svimjing.

Hann er sjálvur ein av føroysku svimjarunum, sum hevur eina gylta fortíð á Oyggjaleikunum, og hann ætlar at stríðast fyri eini støðugari menning innan føroyska svimjing.

### Seta føroysk met

Lopið til at gerast besta svimjitjóðin á Oyggjaleikunum skal ikki takast í einum.

– Í ár fara vit leggja okkum eftir at blíva nummar fimm í samanløgdu støðuni í svimjing. Men vit stíla eisini eftir, at allir átta svimjararnir á liðnum seta føroysk met undir Oyggjaleikunum.

– Landsliðssvimjararnir hava ongantíð áður verið so væl fyri, sum teir eru nú, og tí kunnu teir allir seta føroysk met. Teir hava evnini og formin til at gera tað. Vit hava havt støðugt landsliðsarbeiðið í tvey ár nú, og tað ger sjálvsagt svimjararnar betur, sigur Petur Heðin á Fløtti.

Hann heldur, at tað tykist sum um svimjararnir stórtrívast í løtuni, og gongur alt upp í eina hægri eind á Oyggjaleikunum, so ber til at røkka einum sera góðum úrsliti.

### Sera tøtt kapping

Føroyska svimjilandsliðið er fyrst og fremst mannað við svimjarum, sum hava verið við til Oyggjaleikir áður. Einasti nýggi svimjarin á liðnum er Malan Mikkelsen.

– Hetta er elitan í føroyskari svimjing í løtuni. Eivind, Dia og Ásbjørn ætla sær at gera ein ordiligan vørr, áðrenn teir gevast, og hinir svimjararnir vita eisini, hvat skal til, sigur landsliðsvenjarin.

– Kappingarnar á Oyggjaleikunum eru sera tættar, og tí kann alt tapast upp á ein vánaligan start ella eina miseydnaða vending. Men um vit sleppa undan mistøkum, so kunnu vit fáa nógv góð úrslit.

Petur Heðin á Fløtti heldur, at Oyggjaleikirnir eru ein góð kapping hjá føroyskum svimjarum.

– Á Oyggjaleikunum kunnu føroyskir svimjarar verða við heilt har frammi, og tað er spennandi. Í HM ella EM kanst tú koma út fyri, at tú endar sum nummar 40 av 50 svimjarum. Tí haldi eg, at Oyggjaleikirnar hava nógv at siga hjá føroyskum svimjarum, sigur landsliðsvenjarin.



**Svimjing**

Eivind Eysturoy
Kristoffur Hentze
Dia Jacobsen
Andrass Thomsen
Ásbjørn Hansen
Benthe S. Andersen
Shaila millum Garðarnar
Malan Mikkelsen



# Kvinnurnar skulu verja gullið

**Føroysku fótbóltskvinnurnar vunnu gull í fyrstu royndini á Oyggjaleikunum seinast. Nú skal gullið verjast, men harðasti kappingarneytin frá seinast er ikki við. Hinvegin er nýggjur sterkur avbjóðari komin á vøllin**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*



*– Tað er sera hart at skula spæla dyst tríggjar fylgjandi dagar. Vit skulu spæla tveir dystir mitt um dagin, tá ið tað er heitast, so tað verður strævið hjá liðnum, sigur Álvur Hansen, landsliðsvenjari.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Føroysku fótbóltskvinnurnar skúgvaðu so at siga alla mótstøðu til viks á Oyggjaleikunum fyri tveimum árum síðani.

Føroyska liðið vant burtur úr øllum liðunum, sum tær møttu á veg til finaluna, og í finaluni eydnast teimum í tøttum dysti at vinna á Álandi.

Nú skulu teir 18 spælararnir royna at endurtaka bragdið á Guernsey.

– Tað slepst ikki uttan um, at vit skulu verja gullið, og at okkara lið verður gjørt til favoritt í kappingini. Men tað er trupult at siga frammanundan, hvussu vit fara at standa okkum, og vit rokna als ikki við so stórum sigrum hesaferð, sigur Álvur Hansen, venjari hjá fótbóltskvinnunum. Seinast vann føroyska liðið upp í heili 16-0!



*Føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti var við á Oyggjaleikunum fyri fyrstu ferð seinast, og tær vóru í flokki fyri seg í hesi kapping*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Gotland bjóðar av

Fótbóltskappingin á Guernsey er skipað í tveimum bólkum við fýra liðum í hvørjum. Saman við Føroyum eru Isle of Man, Isle of Wight og Jersey. Fyri tveimum árum síðani vann føroyska liðið 11-0 á Isle of Man og 16-0 á Jersey. Isle of Wight slapp ikki víðari í kappingini, tí tær taptu til millum annað Jersey.

Um ikki nógv er broytt upp á tvey ár, kann roknast við, at føroyska liðið vinnur innleiðandi bólkin hjá sær. Gera tær tað, so koma tær í ár beinleiðis í finaluna, tí eingin hálvfinala verður spæld hesaferð.

Fyri tveimum árum síðani var liðið av Álandi harðasti kappingarneytin hjá Føroyum, men tær eru ikki við hesaferð. Orsøkin sigst vera, at hesaferð hava álendingar sent menninar avstað.

Hinvegin er lið av Gotlandi nú komið við, og tað verður roknað við nógvum av hesum liði.

Eitt felag av Gotlandi spælir við í næstbestu svensku fótbóltsdeildini, og tvey feløg eru við í 3. deild í Svøríki. Harafturat hava gotlendingar eisini heimliga fótbóltskapping.

### Profilur burtur

Fleiri broytingar eru gjørdar á føroyska liðnum síðani seinast. Stóri profilurin og spælskiparin, Helga Ellingsgaard, er ikki við hesaferð, og aðrir spælarar eru eisini farnir burtur av.

– Vit mangla ein spælara sum Helgu. Hon var ein profilur á liðnum og gekk undan. Men hinvegin hava vit fingið fleiri sera góðar spælarar við á liðnum, so samanumtikið er liðið minst líka gott hesaferð, sum tað var seinast, sigur Álvur Hansen.

Hann heldur, at spælararnir eru vorðnir javnt góðir, og nógvir av teimum nýggju hava vist góðar dygdir.

### Hørð skrá

Fótbóltskappingin á Oyggjaleikunum byrjar sunnudagin, og tí fær føroyska liðið tveir heilar dagar at venja í á Guernsey, áðrenn sjálvir dystirnir byrja.

– Tað er gott fyri okkum, at vit kunnu venja okkum eitt sindur til umstøðurnar, áðrenn sjálv kappingin byrjar, sigur Álvur Hansen. Men tá ið bólkaspælið byrjar, verður skráin hørð. Tríggir dystir í tríggjar dagar krevja nógv, og tað er venjarin eisini greiður yvir.

– Tað er sera hart at skula spæla dyst tríggjar fylgjandi dagar. Vit skulu spæla tveir dystir mitt um dagin, tá ið tað er heitast, so tað verður strævið hjá liðnum. Eg havi 18 góðar spælarar við, og tí verður tað gjørligt hjá mær at skifta eitt sindur út á liðnum, so onkrir spælarar fáa eitt sindur av hvíld, sigur Álvur Hansen.

Tá ið bólkaspælið er liðugt, verður spælt um plaseringarnar. Skuldi tað hent, at føroyska liðið vann sín bólk, so eru tveir hvíludagar áðrenn finaluna.

**Fótbóltur**

Anna Kristina Joensen
Randi S. Wardum
Ragna B. Andreassen
Eyðvør úr Dímun
Heidi Heinesen,
Bára S. Klakstein
Rannvá B. Andreassen
Vivian Bjartalíð
Halltóra Joensen
Sólvá Joensen
Malena Josephsen
Annelisa Justesen
Eyðfríð Kristiansen
Ann Silja á Borg Madsen
Ása Dam á Neystabø
Meibritt Olsen
Una Olsen
Kristina D. Simonsen
Álvur Hansen, venjari
Malan Mohr Dahl, hjálparvenjari